

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 11 - 2011

# Oljutjóvar gera um seg

Herurin í Nigeria legði í gjár hald á eitt skip, tí tað vísti seg, at skipið hevði 5.000 tons av stolnari olju í tangunum. Skipið sigldi undir nigeriskum flaggi, og løgreglan tók tveir av manningini. Myndugleikarnir siga, at oljustuldur er ein støðugt veksandi trupulleiki í Nigeria, sum telist millum heimsins størstu oljulond. Seinasta vikuskiftið vórðu fleiri menn tiknir í sambandi við eitt átak hjá herinum, sum endaði við, at herurin kom fram á 30 prámar, sum vóru fermdir við ráolju, sum var stolin. Reuters skrivar, at tjóvarnir fremja ofta herverk á oljuútbúnaðin, tá teir stjala olju, og at hetta hevur fingið eitt av altjóða oljufeløgunum at skerja sítt virksemi í Nigeria. Tíðindastovan nevnir ikki felagið við navni. Sambært myndugleikunum eru nógvir oljutjóvar tiknir í seinastuni, og myndugleikarnir hava avdúkað næstan 2.000 ólóglig oljureinsiverk.